Mentanarnáttin 2009 verður hildin í Havn fríggjadagin 5. juni. Hóast tiltøkini byrja longu kl. 10:00 um morgunin og halda á til kl 04:00 morgunin eftir, verður Mentanarnáttin 2009 sett í Gamla Kommunuskúlagarði kl. 18:00. Í ár er tað Jens Marius Poulsen, fráfarandi kommunustjóri, ið heldur setanarrøðuna. Í sambandi við setanina spælir Havnar Hornorkestur, og dansibólkurin Hóps framførir.

# Mentanarnáttin 2009

**10:00-14:00 Túnabóltur** í Gamla Kommunuskúlagarði
næmingar úr 6. og 7. flokki spæla

**10:00-19:00 SMS Fimm Klakvíkskvinnur** hava listaframsýning á torginum í SMS. Tær fimm eru: Dagny Tróndheim, Astrid Mouritsen, Sigga Petersen, Gull-Britt Hansen og Lydia Petersen.

**10:00-21:00 Føroya Fornminnissavn** og Útisavnið hava opið í Hoyvík

**10:00-22:00 Føroya Náttúrugripasavn,**
V.U.Hammershaimbsgøta er opið

**10.00-24:00 Gamla Reinsaríið í nýggjum hami:**
10:00 Kaffisøla og okkurt til matna
12:00 Ponyríðing við ríðiskúlanum hjá Hera
13:00 Andlitsmáling til børn
17:00 Mótasýning
Steðgur
20:30 Skemt við Riu Tórgarð og Súsonnu Tórgarð
21:00 Mótasýning: Sirri, Siri, Klivin, Niels L. Arge og Royal
23:00 Tónleikur Undirbeat

**11:00-21:00 Listaskálin,** Oman Viðarlund,
Vilmantas – samleiki og fasta framsýningin eru opnar

**11:00-23:00 Linsan,** Áarvegur
Annette Bredstrup sýnir fram vovnar myndir av fiski

**13:00-14:00 Súkklurnar fram!** Komið og súkklið frá Ítróttarhøllin á Hálsi gjøgnum miðbýin, út til Tekniska skúla. Hetta er sami teinur, sum SIC framførir í tónleiki á Tjóðpallinum á midnátt

**14:00-17:00 Karius og Baktus í Grasagarði**
Barnatannrøktin, sum verður 50 ár, skipar fyri tiltakinum

**14:00-17:00 Hin góði matpakkin í Grasagarði**
Við plakat, faldara og mateskju, ið øll fáa sum gávu, kunnar Fyribyrgingarráðið um hin góða matpakkan

**15:00 Barnakór í Grasagarði**
Eldra kór musikkskúlans, sum eru børn úr 3.-7. flokki, ið syngja undir leiðslu av Joannu Johansen og Sunleivi Rasmussen, koma í Grasagarð at syngja

**15:00-18:00 Opið hús á Lágargarði,** Stoffalág 84
Harmoniku- og klavertónleikur kl. 16.00 við næmingum úr Tórshavnar musikkskúla

**16:00 Tórshavnar musikkskúli í Lágargarði,** Stoffalág 84
Harmoniku- og klavertónleikur verður á Lágargarði mentanarnáttina kl. 16.00 við næmingum úr Tórshavnar musikkskúla

**16:00-22:00 Listagluggin,** Niels Finsens gøta 25
Millum menn og kvinnur í Havn - myndlistaframsýning Tórbjørn Olsen og Zacharias Heinesen

**16:00-23:00 Leirlist** í Varðagøtu 1
Verkstaður og skulpturgarðurin er opin

**16:00-23:00 Smiðjan í Lítluvík,** Skálatrøð
Rannvá Holm Mortensen hevur myndlistaframsýning

**17:00 Óli Jacobsen** vísir runt og sigur frá í Gamla Kirkjugarði
Óli hevur higartil skrivað 100 greinar úr Gamla Kirkjugarði.
Rundferðin byrjar við høvuðsportrið

**17:00-20:00 Tilhaldið í Tórsgøtu**
Drekkamuður við heimabakaðum í kjallaranum í Tilhaldinum, inngongd frá Grasagarði

**17:00-23:00 Bojsensgarður**
Gamli urtagarðurin aftan fyri H.N Jacobsens bókahandil er opin

**18:00 Setan í Gamla Kommunuskúlagarði**
Havnar Hornorkestur spælir. Jens Marius Poulsen kommunustjóri setur Mentanarnáttina. Dansibólkurin Hóps framførir 'Let it rock' eftir setanina.

**18:00 Havnar Kirkja.**
Kirkjan er opin. Tónleikaframførslur verða kl 21:00 og 23:00

**18:00-20:00 Ráðhúsið**
Ráhúsið á Vaglinum er opið

**18:00-20:00 Gongini,** Heima í Havn
Eirikur Lindenskov vísir runt og sigur frá

**18:00-22:00 Ríkisumboðið,** Laðabrekka
Amtmansgarðurin er opin. Kl 20:00 syngur kórið Dropar

**18:00-22:00 Westward Ho,** Lágakai. Opið skip

**18:00-22:00 M/S Thorshavn,** Lágakai.
Opið skip og framsýning umborð

**18:30 Túnabóltur** í Gamla Kommunuskúlagarði
fyri FM- og steypavinnarar úr øllum landinum

**18:30 Riddarakrossur frá 200**
Grundlógardag 2009 handar rokkbólkurin 200 fyrsta almenna riddarakrossin við áskriftini 'Stokkholmssyndromið'. Handanin er við hornblástri í Vágsbotni.

**18:30 TUTL, Glade Hjørn**
Dreingjakórið undir Brúnni syngur

**18:30-22:00 Snarskivan,** Gamli Kommunuskúlagarður
Ingun Hansen hevur myndlistaframsýning

**18:45 Havnar Bio**
Filmssýning: **Nátt á Fornminnissavninum** (Nat på museet)

**19:00 Snarskivan,** Gamli Kommunuskúlagarður
Føroya Klarinettorkestur spælir

**19:00 Handlarnir í SMS** lata aftur

**19:00-21:00 Tryggingarfelag Føroya,** Kongabrúgvin
Opið hús, skipað rundferð hvønn hálva tíma at síggja bygning og myndlist

**19:00-21:00 Hoyvíkar Kirkja,** Kirkjustræti, Hoyvík
Kirkjan er opin

**19:00-22.00 Tórshavnar Móttøkuhús og Myndasavn,**
Tróndargøta. Høvi at síggja listasavnið hjá Tórshavnar kommunu

**19:00-23:00 Müllers Pakkhús**
**Býarløg** - myndlistaframsýning, Inger Smærup Sørensen er kurator og setur framsýningina. Listafólkini eru Hanni Bjartalíð, Hansina Iversen og Anker Mortensen. Eftir setanina lesur Oddfríður Marni Rasmussen yrkingar

**19:15 Felagið Tórshavn,** gongubólkurin
Gongutúr oman eftir Varðagøtu við frásøgufólki

**19:30 TUTL,** Glade Hjørn
Dansifelagið í Havn kvøður

**Kl 20:00 Ríkisumboðið,** Laðabrekka
Kórið Dropar syngur í Amtmansgarðinum

**20:00 Havnar Bio**
Filmssýning: **Einglar og illir Andar** (Engle og Dæmoner)

**20:00 Beinta Vilhelmsen,** Niels Finsensgøta 38, við Havnará
Mótasýning við Beintu Vilhelmsen, Cosmeto og Salong Shair
Beinta Vilhelmsen, skraddari hevur opið til kl. 23:00

**20:00-21:00 Tilhaldið í Tórsgøtu**
Felagssangur á veghæddini við Simma & kompaní

**20:00 og 21:30 M/S Thorshavn,** Lágakai
Stuttur sightseeing túrur út um Havnina, tilmelding umborð

**20:00-23:00 Miðlahúsið**
Opið hús við tónleiki, kaffi og køku

**20:00-23:00 Altjóðaskrivstovan,** J.C.Svaboes gøta 14
Opið hús, øll kunnu koma at práta um framhaldandi lestur uttanlands

**20:30 TUTL,** Glade Hjørn. Bólkurin Marius spælir

**21:00 Havnar Kirkja.** Hugnaligur kafélíkur tónleikur og sangur í ymiskum stíli við Sigrid Sivertsen, sangur, Raymund Nielsen, guitar, Annette Nielsen, violin

**21:00 Tinghúsgarðurin.** Konsert við Havnar Hornorkestri

**21:00 Ebenezer,** Niels Finsens gøta. Opið hús við sangløtu í stórasali, har Sangkórið í Ebenezer luttekur

**21:00 Havnar Bio.** Filmssýning: **Terminator Salvation**

**21:00-22:00 Reinsaríið í Tórsgøtu**
Mótasýning: Sirri, Siri, Klivin, Niels L. Arge og Royal

**21:30 TUTL,** Glade Hjørn. Fløguaktuelli bólkurin 200 spælir

**22:00 Havnar Kirkja.** Tónleikaløta við Føroya Klarinettorkestri

**22:00 Guðrið Hansdóttir í Mess**
Almenn útgávureseptión fyri nýggju fløguna hjá Guðrið, The Sky is Opening. Guðrið spælir nøkur løg og signerar fløgur. Atgongumerki til útgávukonsertina hjá henni, sum er vikuskiftið aftaná, vera eisini til sølu. Mess skrivstovan er opin til midnátt.

**22:00 Norðurlandahúsið,** Norðari Ringvegur
**Tíðarbil** - myndlistaframsýning við Inga Joensen og Janusi Kamban, sála, har Havnin er í fokus. Framsýningin, ið fyri mesta partin er fotolist hjá Inga Joensen, hevur tíð og broytingar sum tema. Framsýningin Tíðarbil fevnir um alt húsið uttan Høllina og fleiri sløg av listagreinum. Undan framsýningini framførir Jóna K. Thomsen 'Eitt minni', sum er rørslubrot úr modernaðu dansiframsýningini 'Kyrra', ið verður frumframførd í Norðurlandahúsinum 19. juni 2009. Heðin Mortensen borgarstjóri setir framsýningina.

**22:30 Ebenezer,** Niels Finsens gøta. Ungdómskonsert á parkeringsøkinum norðan fyri Ebenezer

**22:30 TUTL,** Glade Hjørn. Fløguaktuelli Petur Pólson framførir

**23:00 Havnar Kirkja.** Svenskur og bulgarskur fólkatónleikur. Anna Katrina Petersen, sangur, Angelika Nielsen, violin, Mikael Blak, kontrabas

**23:00 Handlarnir í miðbýnum lata aftur**

**23:00 Havnar Bio.** Filmssýning: State of Play

**23:30 Vaglið.** Happening undir opnum himni mitt á Vaglinum

**23:30 Havnar Bio.** Filmssýning: **Terminator Salvation**

**24:00-01:00 Tjóðpallurin**
100 ár - 1000 sár, rokkbólkurin SIC framførir bílagt tónleikaverk, ið er ein biltúrur gjøgnum miðbýin aftur við filmi hjá Landsverkfrøðinginum frá 1977. Teinurin er hin sami, sum verður súkklaður kl 13:00 sama dag. Konsertin við SIC er almenn og ókeypis

**01:00-04:00 La Terrasse** í Tórsgøtu
La Terrasse skipar fyri undirhaldi við plátuvendara og samstundis skipar Rio Bravo fyri grill-party

**01:00-04:00 Gamla Reinsaríið** í Náttarhami
Undirbeat í mentanargøtuni

TÓRSHAVN 1909-2009
Fólkavald kommuna í 100 ár

**Tórshavnar kommuna**